| LÝSING AV ÚTBÚGVING |
|---|
| **Bachelor í sjúkrarøktarfrøði**<br>*Bachelor of Science* (B.Sc) *in Nursing* |
| |

| | |
|---|---|
| SLAG AV ÚTBÚGVING OG ÁRAMÁL | Single degree ( 240 ECTS). Útbúgvingin er sett saman av einum ástøðiligum parti, ið er 150 ECTS og einum kliniskum parti, ið er 90 ECTS. Útbúgvingin er býtt upp í 8 lestrarhálvur |
| ÚTBÚGVINGARSTOVNUR/-AR | Fróðskaparsetur Føroya, Deildin fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi<br>University of the Faroe Islands, Faculty of Health Sciences |
| STOVNUR, IÐ GÓÐKENNIR ÚTBÚGVINGAR | Uttanríkis- og Mentamálaráðið (UMMR) |
| TÍÐARBIL, VÍST VERÐUR TIL | Frá 2022 |
| STIG | 1st Cycle sambært QF-EHEA og stig 6 sambært EQF-LLL |

| A | ENDAMÁL |
|---|---|
| | Endamálið við útbúgvingini er at geva lesandi førleika til at kunna virka sjálvsstøðugt sum sjúkrarøktarfrøðingur. Útbúgvingin gevur førleika til at útinna, miðla og leiða sjúkrarøkt, sum er heilsufremjandi, heilsuvarðveitandi, fyribyrgjandi eins og viðgerandi, endurmennandi og linnandi. Gevur førleika til at samstarva við sjúklingar, avvarðandi, samstarvsfelagar og aðrar fakbólkar. Harumframt førleika til at menna sjúkrarøkt, útinna menningararbeiði og gera nýtslu av granskingararbeiði á heilsuøkinum. Undirvísingin er grundað á gransking og evidens, og útbúgvingin mennir teir kritisku, greinandi og reflekterandi eginleikarnar hjá lesandi |

| B | EYÐKENNI | |
|---|---|---|
| 1 | GREIN(AR) / EVNISØKI | Høvuðsdentur er á sjúkrarøktarástøði og sjúkrarøktarpraksis (150:90) |
| 2 | ALMENNUR / SERLIGUR DENTUR | Almenn sjúkrarøktarfrøðiútbúgving, uttan serøki |
| 3 | KÓS | Akademisk útbúgving rættað ímóti sjúkrarøktarfakliga yrkinum |
| 4 | SERLIG EYÐKENNI | Fakliga innihaldið í útbúgvingini er grundað á vitan frá sjúkrarøktarfakinum í samanhangi við heilsu-, náttúru-, samfelags- og hugvísindalig fak. Undirvísingin er á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi og á góðkendum kliniskum útbúgvingarplássum |

| C | STARVSMØGULEIKAR OG FRAMHALDSÚTBÚGVING |
|---|---|

| | | |
|---|---|---|
| 1 | STARVSMØGULEIKAR | Útbúgvingin gevur rætt til løggilding, til heitið sjúkrarøktarfrøðingur og til at arbeiða sum sjúkrarøktarfrøðingur. |
| 2 | FRAMHALDSÚTBÚGVING | Lokin útbúgving gevur atgongd til útbúgving á master stigi í sjúkrarøkt, cand.cur (2nd cycle) og aðrar heilsuútbúgvingar á master stigi. Neyðugt er at kanna upptøkutreytir í hvørjum føri, tí universitet hava ymiskar reglur |

| | | |
|---|---|---|
| D | **ÚTBÚGVINGARHÁTTUR** | |
| 1 | ARBEIÐSLAG Í SAMBANDI VIÐ LÆRU- OG UNDIRVÍSING | Undirvísingin er skipað sum fyrilestrar, venjingar, bólkaarbeiði, heimauppgávur, lestrarspurningar, spurnarkapping, sjálvlestur og verkætlanararbeiði. Harumframt samstarvslæru (*cooperativ learning)* og javnlíkalæru (*peer learning).* Undirvísingarhættirnir eru lýstir í einstøku skeiðslýsingunum. Skjalaskjáttan verður brúkt sum amboð til lýsing og refleksjón av lærutilgongdini í kliniska útbúgvingarpartin |
| 2 | PRÓVTØKUHÆTTIR | Skrivligar próvtøkur, skrivligar próvtøkur við munnligari próvhoyring/framløgu, samansett skrivlig, verklig og munnlig próvhoyring. Útbúgvingin endar við skrivligari bachelor ritgerð, ið verður vard munnliga. Í kliniska útbúgvingarpartinum verður støðumet brúkt sum próvtøkuháttur |

| | |
|---|---|
| E | **ÚTBÚGVINGARFØRLEIKAR** |
| 1 | ALMENNIR FØRLEIKAR |
| | **Akademiskt arbeiðslag:** duga at arbeiða kannandi og fyrihalda seg kritiskt og greinandi til spurdómar. Herundir orða, lýsa, greina og tulka fakligar spurdómar og seta fram niðurstøður og perspektivering<br>**Mál:** megna at orða seg greitt og neyvt, bæði munnliga og skrivliga<br>**Samskifti:** megna at samskifta, samstarva og skapa sambond við menniskju<br>**Sjálvstøðugt arbeiðslag:** duga at arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í toymum<br>**Vitan í verki:** duga at inna vitan í verki<br>**Trupulleikaloysn:** duga at staðfesta, lýsa og loysa trupulleikar<br>**Støðutillagan**: megna at laga seg umsøðunum og virka í mun til hvørja støðu sær, og megna at arbeiða undir trýsti.<br>**Menning:** duga at menna og dagføra egnu læring<br>**Tøkni**: duga at brúka kunningar- og samskiftistøkni |
| 2 | FAKLIGIR FØRLEIKAR |
| | **Yrkisgrundarlag:** duga at útinna sjúkrarøkt við atliti at lógum, leiðreglum og etiskari umhugsan, ið eru grundarlag undir yrkinum, og við støði í vitan og kunnleika um fakið.<br>**Samskifti:** duga at samskifta professionelt og skapa terapeutiskt samband við sjúkling og avvarðandi, við atliti at teirra tørvum og fortreytum.<br>**Relatión**: duga at vera empatisk/ur, etisk/ur og refleksiv/ur í øllum sjúkrarøktarstøðum, eisini teimum truplu og kompleksu.<br>**Klinisk støðutakan:** megna at taka vælgrundaðar kliniskar avgerðir við støði í praksis og granskingarvitan. Herundir at taka hædd fyri likamligum, sosialum, sálarligum, mentanarligum, andaligum og umhvørvisligum faktorum hjá sjúklingum og avvarðandi.<br>**Leiða:** megna at leiða kliniska sjúkrarøkt og taka kliniskar avgerðir tvørtur um fakbólkar, øki, stovnar eins og í heimi hjá sjúklingum/borgarum. Førleika at leiða, fyrisita og samskipa sjúkrarøktina og viðgerðina hjá sjúklingum. Eins og førleika at leiða eitt toymi av samstarvsfeløgum, lesandi og næmingum.<br>**Samstarva:** førleika at arbeiða saman við einstaklingum og í toymum við tí endamáli at fremja og útinna dygdargóða sjúkrarøkt til hvønn einstakan. Megna at samstarva við sjúklingin, avvarðandi, starvsfelagar og aðrar yrkisbólkar uttan mun til etniska, mentanarliga og átrúnaðarliga bakgrund. |

| | |
|---|---|
| | **Menna:** førleika at reflektera kritiskt um praksis og taka stig til at dagføra sjúkrarøktina í mun til nýggja sannkenning. Førleika at taka lut í menningar- og granskingarverkætlanum í sjúkrarøkt, og at brúka granskingargrundaða vitan í sjúkrarøktini.<br>**Miðla:** duga at miðla fakliga vitan til sjúklingar, avvarðandi, starvsfelagar, tvørfakligar samstarvsfelagar og leikfólk.<br>**Heilsutøkni**: duga at nýta og fyrihalda seg kritiskt til tøkni og tøkniamboð í sjúkrarøktini |

| F | FULLFÍGGJAÐUR LISTI VIÐ LÆRUÚRTØKUNI FRÁ ÚTBÚGVINGINI |
|---|---|
| | **Eftir lokna útbúgving skal tann lesandi vera før/ur fyri at:**<br>• Greiða frá fakinum og virkisøkinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum<br>• Greiða frá og meta um ástøði, háttaløg og praksis í sjúkrarøktaryrkinum<br>• Meta um tørv á sjúkrarøkt og útinna sjúkrarøkt, sum fatar um likamligar, sálarligar, sosialar og andaligar tørvir<br>• Vísa hegni í at sjálvstøðugt og í samstarvi við sjúkling og avvarðandi, staðfesta røktartørv, skipa røktarætlan, útinna, eftirmeta og skjalfesta sjúkrarøkt og viðgerð<br>• Greiða frá lógum, kunngerðum og leiðsluskipanum, ið eru galdandi á heilsu- og almannaøkinum<br>• Reflektera yvir spurdómar og etiskar tvístøður í sjúkrarøkt<br>• Greiða frá og meta um heilsutøkni sum amboð í kliniskari sjúkrarøkt<br>• Greiða frá og meta um umhugsni í at kunna, vegleiða og undirvísa sjúklingum, avvarðandi og samstarvspørtum, við atliti at teirra luttakarafortreytum<br>• Miðla fakligar spurdómar til bæði fakfólk og leikfólk<br>• Meta um og reflektera um samskifti við sjúkling, avvarðandi og samstarvspartar, ið er grundað á ástøði um professionelt samskifti<br>• Greina og meta um viðurskifti, ið hava týdning fyri ta professionellu relatiónina millum sjúkrarøktarfrøðing og sjúkling/borgara, avvarðandi og samstarvspartar<br>• Greiða frá umhugsni í samband við fakligt og tvørfakligt samstarv, og at vera sjálvstøðugur partur av tí<br>• Greiða frá umhugsni í sambandi við samstarv við sjúkling og avvarðandi við atliti at etnisku, mentanarligu, átrúnaðarligu og málsligu bakgrundini<br>• Greiða frá umhugsni í sambandi við at leiða kliniska sjúkrarøkt og at taka kliniskar avgerðir í sjúkrarøktini<br>• Seta fram uppskot,  ið menna sjúkrarøktina samsvarandi samfelagskrøvum og nýggjari fakligari vitan<br>• Leita fram, meta um og gagnnýta nýggja granskingargrundaða vitan<br>• Greina og meta um viðurskifti og tiltøk, ið fremja og varðveita heilsu og fyribyrgja sjúku<br>• Staðfesta lærutørv og skipa egna læring í ymiskum læruumhvørvum |